Tíðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov

Marknaðardeild: Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
Blaðfólk: Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
Ítróttur: Jákup Mørk

Myndamenn: Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
Útgevari, uppseting: Sp/f Sosialurin
Bústaður: Argjavegur 26, Argir

Postadr: Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Telefon: 311820
Telefax. 314720
e-mail: post@sosialurin.fo
Lýsingar: lysing@sosialurin.fo
Prent: Sosialurin

# Vágatunnilin og framtíðin

## *Oddagrein*

SPURNINGURIN um at gera tunnil undir Vestmannasund er nógv frammi í fjølmiðlunum, og eingin ivi er um, at hann fer at eiga týðandi part í samfelagsorðaskiftinum í langa tíð fram. Bara tað at farið verður undir at gera fyrsta tunnil av slíkum slag í Føroyum er sjálvandi áhugavert og forvitnisligt í sjálvum sær. Hetta verður ein nýggjur varði í okkara infrastrukturi, sum fer at binda landið enn tættari saman. Tað fer at stytta leiðina millum miðsteðarøkið og eina av høvuðs samferðsluæðrunum til og frá landi okkara, nevniliga flogvøllin í Vágum. Sum so er hetta ein positiv avbjóðing fyri okkara samfelag.

MEN nettup tí at hetta er nakað nýtt fyri okkum er so altumráðandi, at ljóskastarin verður settur á verkætlanina frá byrjan. Her eigur einki at verða dult ella undirmett. Og her eiga vit ikki bara at stara okkum blind í tí, sum útlendsku serfrøðingarnir siga og siga ja og amen. Og kanska er nettup júst henda tíðin, tá tilboð verða latin upp og viðgjørd, kannað og eftirmett, tann mest avgerandi av øllum.Nú kann onkur spyrja, hvussu tað ber til, at vit longu eru farin í hernað móti hvørjum øðrum í sambandi við útbjóðingina av vegagerðini! Hvussu verður ikki, tá sjálv tunnilsgerðin verður at fara í gongd? Hvussu og ikki, so eiga tey fólk, sum hava fingið litið upp í hendi ábyrgdina av hesum álvarsliga projekti, at verða opin, varin og ikki minst professionell. Tí fyri tað um eitt samtak kann bjóða seg til at gera arbeiðið fyri minni enn „vit" høvdu mett, merkir tað ikki, at allar súðir eru syftar og vit bara kunnu seta okkum afturá og halda, at nú gongur alt av sær sjálvum.

TAÐ er ein sannroynd, at nærum øll slík projekt við undirsjóvartunlum vit vita um, eru vorðin nógv nógv dýrari enn upprunaliga mett. Vit kunnu taka tunnilin millum Ongland og Frakland, tann undir Stórabelt, tunlar í Noregi osfr. Hóast talan hevur verið um feløg, ið hava havt royndir við slíkum tunlum, eru arbeiðini vorðin nógv  dýrari enn ætlað.  Nú koma so „somu" fólk henda vegin og bjóða sær at gera fyrsta tunnil av sínum slag mitt úti í Atlantshavi. Ja tey koma entá og bjóða seg til at gera hann nógv bíligari enn vit sjálvi høvdu mett. Og so eru vit øll so glað so glað. Tað er her vandin lúrir. Og vit hava skyldu til at vera vakin. Í ringasta føri verða tað okkara eftirkomarar, sum koma at rinda gildið. Hava teir, ið bjóða sær at gera arbeiðini, tikið hædd fyri øllum teimum trupulleikum, sum bráddliga tóku seg upp, tá líknandi arbeiði vórðu gjørd aðrastaðni? Hava teir lagt upp fyri? Hava teir so eisini tikið fyrivarni við um tey ivamál, sum kunnu koma fyri júst her? Fyri tað um royndir eru tiknar, hvør sigur so, at hesar geva okkum rætta svarið. Hava vit einki at læra av tunlinum til Sumbiar? Og tað var ikki undir havsins botni! Tað má vera eitt krav til myndugleikar og felagið Vágatunnilin, at aðrir serfrøðingar tjekka av, um tilboðini eru reell og halda. Tað má ikki enda við, at vit bara fáa eitt hol í jørðina fult av sjógvi.

***Sosialurin***

Viðmerking:

# Rópandi afturhaldskórið vil bara grugga

Torført er at finna líkinda innihald í tí, sum afturhaldskórið dagliga rópar út um geilar. Hjá afturhaldskórinum er tað heldur ikki innihaldið, sum telur. Í øllum orðaskiftinum um fullveldi havi eg ikki funnið eitt einasta ítøkiligt uppskot um, hvussu vit skulu skipa hetta land, um fullveldisætlanin hjá landsstýrinum ikki kann verða framd á hesum sinni. Tað er einans uppskotið hjá landsstýrinum, sum er møguligt og ráðiligt at  seta í verk, tí hetta uppskot er gjøgnumarbeitt, tað hevur eina greiða ætlan fyri framtíðina, og tað sigur greitt frá, hvar ábyrgdin skal liggja. Rópini frá afturhaldskórinum hava einans til endamáls at grugga og gera fólk í ørviti, soleiðis at tey hvørki skulu vita út ella inn.

**Lítil dugur í aftirhaldskórinum**
Tað, sum afturhaldskórið ber fram, er láturligt og uttan trúvirði. Afturhaldskórið melur rópandi uttan um kjarnuna í trupulleikanum. Tey tora ikki at viðgera sjálvt málið; ella duga tey ikki (?) Ístaðin ríður afturhaldskórið niðarlaga, og brúkar persónliga útspilling sum vápn í stríðnum ímóti at vinna Føroyum fullveldi og satt fólkaræði.

**Royna at grugga**
Lítið skil er í rópunum frá afturhaldskórinum. Ta einu løtuna vilja tey hava meira sjálvstýri, í somu løtu vilja tey hava meira samband. Eina aðra løtu vilja tey hava blokkin burtur, og í somu løtu skal hann minkast. Vit skulu vera serstøk tjóð, men samstundis skulu vit vera danskir ríkisborgarar. Felags fyri øll hesi mótstríðandi uppskot er, at tey verða einans brúkt til at grugga við. Tey eru als ikki ítøkilig og kunnu einans vera til óbótaligan skaða, skuldi tað ótrúliga hent, at tey vórðu sett í verk.

**Fólkaræði í Føroyum**
Allir føroyingar, sum hava áhuga fyri politisku stýringini av landinum, eru samdir um, at ríkisrættarliga støðan má og skal broytast. Tilvildarliga og ábyrgdarleysa stýringin av landinum og landsins virðum má ikki kunna koma fyri aftur. Hetta vísti úrslitið á seinasta løgtingsvali, og tað er júst hetta, sum sitandi samgonga hevur sett sær fyri at seta í verk. Nú er tað fólksins vilji, sum skal standa sína roynd – føroyska fólkaræðið skal sleppa at slíta sínar fyrstu barnaskógvar.

Men afturhaldskórið hevur fingið ilt í búkin. Tað er firtið og í øðini av, at eitt ættarlið av yngri og dugnaligum politikarum vil kroysta tær gomlu, korruptu og ódugnaligu afturhaldskreftirnar út av Føroya Løgtingi. Hetta er eisini ein týðandi partur av søguni um stríðið at vinna føroysku tjóðini politiskt frælsi og fólkaræði.

**Uppblást hálovan av útlendskum posamati**
Og afturhaldskórið rópar alsamt harðari, uttan innihald, uttan vit og skil, uttan at hava nakað at seta ístaðin, uttan vónir um nakra framtíð, uttan vilja ella áræði at taka stríðið upp, um á skuldi staðið. Bara tómt orðaskvaldur við uppblástari hálovan av øllum útlendskum posamati og niðurgerð av øllum heimligum royndum at fáa føroyingar at standa saman um hesa sjálvsøgdu skyldu: at taka við endaligu og fullu ábyrgdini av landi okkara.

**Trokað út á ytstu gátt**
Hetta er tað, sum afturhaldskórið ikki orkar at síggja verða framt í verki. Afturhaldskórið vil jarðleggja allar veruligar royndir at seta á stovn fólkaræði í Føroyum. Afturhaldskórið kennir seg trokað út á ytstu gátt, um henda gongd heldur fram. Tí rópar afturhaldskórið so hart í dag. Í oddagreinum í teimum báðum størstu bløðunum verður tann gamla, ábyrgdarleysa og ódugnaliga politiska linjan róst upp til skýggja, meðan teir nýggju og frískaru várvindarnir fáa skot fyri bógvin.

**Føroyingar skulu gloyma fortíðina**
Afturhaldskórið roynir at kasta torvmold í eyguni á fólki, so at føroyingar skulu gloyma fortíðina. Tá føroyska samfelagið fór á húsagang og livifóturin lækkaði eini 30-40% eftir nøkrum heilt fáum árum, vóru vit partur av sokallaða ríkisfelagsskapinum. Ein lítið virðilig støða at koma í sum tjóð. Slíka pínufulla støðu høvdu vit ikki kunnað komið út í, um vit sjálv høvdu havt evsta vald í øllum politiskum málum. Slíka pínufulla støðu vilja vit ongantíð enda í aftur.

Men afturhaldskórið trýr, at føroyingar eru gloymskir og minnast stutt. Um mann bara gevur teimum nøkur gylt lyfti og gyklar eitt sindur fyri teimum; vertin á, hvørt hesi lyfti verða uppfylt ella ikki.

**Skipið skal sigla**
Neyvan fer at gangast rópandi afturhaldskórinum eftir vild hesaferð. Skipið er siglingarklárt. Skiparin er til reiðar á brúnni. Hann skal bara geva boðini um at loysa, tí siglast skal. Og eftir á bryggjuni stendur tað rópandi afturhaldskórið. Tað fær kanska aftur ein kjans næsta túr.

**Velbastað 23. mai 2000**
**John Dalsgarð**

# Kommunistar fyrr og nú

Múrarnir fullu eystanfyri! Eitt kommunistiskt stýri fyri og annað eftir fall. Fólkið í hesum londum, sum hevði trælkað undir jarnhæli kommunismunar, hevði endaliga fingið frælsið í hesum somu londum, har mannarættindir og fólkaræði var ókent fyribrigdi. Var tað onkur, sum loyvdi sær at tala hesum stýrum ímóti, var lagnan: deyðadómur, arbeiðslega, innleggjan á sinnissjúkrahús ella at verða sendur í útlegd.

Fólkið fekk frælsi, og vil ongantíð aftur venda aftur til hesi ræðsluskipanir. Nakrir av gomlu leiðarunum vóru drignir fyri rættin og fongslaðir. Onkur var avrættaður. Treyðugt so, nógvir av hesum gomlu kommunistum eru enn at finna í politikki eystanfyri. Nú eru teir vornir so fittir og hampuligir, og tað sum teir allir eru felags um er, at teir allir eru sosialdemokratar.

Tað funnust eisini føringar, sum taldust millum hetta harkalið, sum høvdu gjørt sær kommunismuna til sína religión - serliga ung lesandi á flatlondum. Tey tilbóðu m.a. Lenin, Stalin og Mao og læru teirra, og eitt sum sermerkti hesi øll var, at tey vóru øll rom loysingarfólk.

Tá so fólkið í Eystureuropa gav kommunismuni durafjórðingin, vistu hesi, sum ikki longur taldust millum ungdómar longur, sær eingi onnur ráð, enn at gerast sosialdemokratar (les javnaðarfólk). Hetta minnir ikki sørt um ein ávísan, sum fór í kleystur á gamalsaldri.

Ein av hesum monnum tók soleiðis til herfyri í blaðgrein, at í javnaðarflokkinum er høgt til lofta og vítt til veggja. Sig so tað. Jú, javnaðarflokkurin hevur roynst sum ein politisk ruskspann tey síðstu árini má ein bara sanna.

Manni Persson hevur sett onkrum av hesum fyrrverandi bekongkommunistum og loysingarmonnum nakrar spurningar, men allir mala teir uttanum og balla alt inn. Við øðrum orðum fáa teir tað at ljóða, sum um teir ikki meintu nakað við tað teir áður stóðu fyri. Tað er eins og teir skrýggja og halda fyri oyruni, tá onkur minnir teir á, at teir einaferð vóru ramir loysingarmenn. Nei, tað var "bara" sjálvstýti teir vildu hava - hvat tað so er.

Eg taki hattin av fyri Arnbirni Thomsen. Hesin dámligi og frintligi maður sigur sum er, at hann er kommunistur og loysingarmaður. Vísi tykkum sum menn! Hví siga tit ikki bara, at tit nú hava broytt meining? Hevði tað ikki verið nógv meiri mannsømuligari, enn at koma við øllum møguligum tvætli?

Hví hesir fyrrverandi kommunistar í dag eru so harðliga ímóti, at land og fólk okkara skal fáa frælsi veit eg ikki, men hugsandi er, at hetta er ein leivd frá tí tíð, áðrenn teir vendu um til javnaðarflokkin, tá teir/tey lovprísaðu ræðslustýrunum eystanfyri, sum traðkaði fólksins vilja og ynski til frælsi undir fótum.

Mín áheitan á tykkum skal vera: Takið annað skinn um bak og blakið tykkara antifrælsi frá tykkum! Brúkið høvdið heldur til nakað skilagott, tí tað er ikki einans ætlað at heingja hattin á. Tað skal annað til, enn at erpa sær av at hava blakað við pappírstallerkum í Fólkatinginum - tað "roysni" vildu vit helst verið fyri uttan.

**Kai Vágfjall**

Lesið eisini Sosialin á Internetinum
www.sosialurin.fo



# Hernaðarstøðirnar høvdu ongan fíggjarligan týdning

*At Danmark hevur fingið avsláttur í limaskapinum hjá NATO er ikki orsakað av hernaðarstøðunum í Føroyum. Hetta greiddi forsætisráðharrin landsstýrinum frá á samráðingarfundinum í gjár*



John Johannessen úr Keypmannahavn

At NATO-limalondini skuldu gjalda eitt limagjald, ið svarar til 3% av bruttotjóðarúrtøkuni er eitt optimalt endamál, ið er galdandi fyri tey øll. Men tað eru langt frá øll londini, ið rinda hetta limagjald.

Orsøkin til hetta er, at talan er um smá lond, ið ikki hava ráð til at rinda limagjaldið.

Millum hesi londini er Danmark. Danmark hevur nevniliga síðani 1976 einans rindað 2,6% fyri sín limaskap.

Men orsøkin til hetta er ikki, at Danmark fær avsláttur í sínum NATO-limaskapi fyri, at NATO sleppur at hava herstøðir í Grønlandi og Føroyum eins og landsstýrið hevur ført fram.

Í drúgva brævaskiftinum millum landsstýrið og danska forsætismálaráðið undan samráðingunum hevur landsstýrið kravt at fáa eina frágreiðing um, hvønn vinning danir hava havt av hernaðarstøðunum í Føroyum.

Men forsætisráðharrin hevur sýtt fyri at greiða landsstýrinum frá hesum. Eisini hevur forsætisráðharrin sýtt fyri, at hernaðarmál skulu vera eitt av punktunum fyri fundin.

Beint áðrenn samráðingarfundin broytti forsætisráðharrin kortini støðu. Hann greiddi á fundinum við serligu fólkatingsnevndina, ið fylgir samráðingunum, frá, at hann fór at koma við frágreiðingini.

Verjumálaráðharrin, Hans Hækkerup, hevur ikki hug at koma við viðmerkingum til málið fyrr enn samráðingarnar eru lidnar.



Jan Petersen, virkardi formaður í Føroyanevndini

# Øll punktini skulu viðgerast eins

*Stjórnin vil ikki seta meira tíð av til at viðgera skiftistíðina á samráðingarfundinum í dag, enn sett verður av til onnur mál*

*John Johannessen, Forsætismálaráðið kl. 17.00*

Danska stjórnin ætlar sær ikki at góðtaka, at landsstýrið fer at leggja størst vekt á at fáa greiðu á skiftistíðini á samráðingarfundinum í forsætismálaráðnum í dag.

Tað eru trý mál, ið tað sambært dagsskránni skal samráðast um, og øll hesi punktini skulu viðgerast.

Hetta greiddi danski forsætisráðharrin, Poul Nyrup Rasmussen, frá á fundinum við Føroya-nevndina hjá fólkatinginum á middegi í dag.

Landsstýrið hevur annars fleiri ferðir gjørt greitt, at tað er skiftistíðin, ið er mest umráðandi málið, ið kemur fyri á fundinum. Tí ælar tað sær eisini at gera mest við hetta málið.

Hini málini, ið skulu viðgerast, eru borgararættindi og samstarv innan umsiting og dómsvald

Sambært virkandi formanninum í Føroya-nevndini, Jan Petersen, metir stjórnin hesi málini vera minst líka umráðandi at viðgera, sum skiftistíðin.

Tað er nevniliga umráðandi fyri danir, at greiða verður fingin á, hvussu farast skal fram, um danir skulu hjálpa føroyingum at umsita eitt føroyskt fullveldi.

Verður hetta veruleiki, er talan um, at føroyingar keypa eina vøru frá dønum. Og hvussu hetta skal skipast, vilja danir hava greiðu á.




